VIÐMERKINGAR

## Toll- og Skattstovan mátti havt okkurt størri mál at fingist við!

**– eitt sindur um lýsingaherferðina hjá Valdemar Lützens Byggibúð**

**Høgni Lützen, stjóri**

Eg síggi, at Toll- og Skattstova Føroya av sínum eintingum er farin at leiðbeina alment um, at allir handlar skulu gjalda MVG av sínari sølu.

Fyri okkum er hetta ein sjálvfylgja – tað stendur jú í lógini, og eg haldi ikki, at eg taki munnin ov fullan, tá eg sigi, at høvdu allar fyritøkur í Føroyum verið so pliktuppfyllandi at gjalda MVG sum fyritøkurnar hjá Valdemar Lützen, so stóð væl til, so vóru ikki allar hasar milliónirnar útistandandi í MVG.

Tá vit hava valt at brúka orðingina um at fólk kunnu keypa "MVG-frítt", so meina vit sjálvandi við, at tað, sum tey annars skuldu goldið fyri MVG av vøruni, sleppa tey undan. Vit lata avsláttur, sum svarar til MVG-upphæddina. At vit gjalda MVG av nettoprísinum eftir MVG-lógini, skal eingin ivast í, heldur ikki Toll- og Skattstova Føroya.

Tað er tí ikki í samsvari við veruleikan, tá Toll- og Skattstova Føroya leggur seg alment út í okkara lýsingaherferð við rættingum, sum kunnu geva fólki ta fatan, at vit selja ólógligt. Lat tað vera púra vist, at tað gera vit ikki

Lat okkum so bara vóna, at Toll- og Skattstova Føroya ikki fer at ávirka jólasølu okkara skeivan vegin. Okkurt annað mátti Toll- og Skattstovan havt at fingist við – eitt nú at innheinta MVG frá teimum, sum ikki gjalda MVG.

Rætt skal vera rætt: Løgfrøðiliga sæð selja vit sjálvandi ikki uttan MVG, men tað er púra vist, at sæð frá kundans síðu, fær hann vøruna fyri ein prís, sum svarar til at vøran er MVG-frí.

# Løgmaður forsømir sína ábyrgd

**Tingkvinna Tjóðveldisfloksins, Heidi Petersen, heldur, at løgmaður hóttir demokratiska rættin hjá andstøðuni, tá hann ikki vil svara hennara fyrispurningi. Tingkvinnan ætlar at spyrja løgmann enn einaferð um at svara skrivliga fyrispurningum**

SKRIVLIGUR FYRISPURNINGURIN

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



– Hetta er heilt burturvið, at løgmaður ikki kann svara einum spurningi, sum snýr seg um yvirskipað politiskt mál. Við at nokta at svara hóttir løgmaður beinleiðis demokratiska rættin hjá andstøðuni at gera vart við seg. Hann er líka nógv løgmaður hjá andstøðuni sum hjá samgonguni, og eg haldi, at hann í hesum føri forsømir sína ábyrgd.

Tingkvinnan hjá Tjóðveldisflokkinum í Norðstreymi, Heidi Petersen, heldur lítið um framferðina hjá løgmanni og samgonguni í sambandi við ein skrivligan fyrispurning, hon ætlaði at seta løgmanni fríggjadagin. Løgtingskvinnan vildi hava at vita frá løgmanni, um samgongan hevur sett sær nøkur langtíðar mál fyri, hvussu føroyska samfelagið skal mennast, hvørji eru hesi málini, og hvussu skulu tey røkkast.

Í tinginum fríggjadagin atkvøddi samgongan ímóti, at løgmaður skal svara fyrispurninginum hjá Heidi Petersen. Tað gjørdi samgongan, tí hon heldur, at fyrispurningurin ikki skal setast løgmanni, men landsstýrismanninum, sum varðar av vinnuni, tað vil siga landsstýrismanninum í vinnumálum, Bjarna Djurholm.

Heidi Petersen hevur kortini ongar ætlan um at gevast so. Hon er sinnað at seta løgmanni skrivliga fyrispurningin einaferð enn.

– Eg ætli mær við vissu at seta spurningin einaferð afturat, og eg rokni við, at eg seti løgmanni spurningin aftur, sigur hon

*Hví letur tú ikki bara landsstýrismannin í vinnumálum, Bjarna Djurholm, svara spurninginum, tá hann varðar av vinnumálum í samgonguni?*

Hesin spurningur snýr seg ikki bara um vinnuna, men er meira yvirskipaður, og tí eigur løgmaður at svara og ikki bara Bjarni Djurholm. Eg vil hava eitt breitt orðaskifti í lag, hvussu vit eiga at menna føroyska samfelagið. Í fyrispurninginum nemi eg bæði gransking, mentan og heilsu, og tá talan er um ein skrivligan fyrispurning stendur tað øllum landsstýrismonnum, ið varða av hesum økjum, frítt at taka orðið, vísir Heidi Petersen á.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 51, 2004
www.kaupthing.fo

# Amerikanska rentan hækkar

Marknaðarrák

Farna vika var soltin hvat viðvíkir lyklatølum. Týska álitistalið ZEW gjørdist eitt lítið sindur frægari í novembur enn oktobur, og amerikonsku framleiðsluprísirnir vóru við 5,0% eisini hægri enn í oktobur, tá talið var 4,4%. Framleiðsluprísirnir frároknað olja og matvørur hækkaðu eisini í novembur, frá 1,8% til 1,9% í mun til í fjør.

Oljuprísurin sveiggjaði millum 37,3 og 40,5 dollarar fyri tunnuna (Brent) í farnu viku. OPEC helt fund fríggjadagin, og í døgunum upp til fundin vóru ymsir talsmenn frammi sum søgdu, at OPEC átti at slakað framleiðsluna. Hóast Saudi Arabia mutaði ímóti, endaði fundurin við, at OPEC fer at skerja framleiðsluna við 1 mió. tunnum um dagin í januar mánaða. Tað fekk tó ikki prísin at hækka merkisvert, tí marknaðurin ivast í, um londini veruliga fara at halda avtaluna um skerjing.

Dollarin hækkaði eitt sindur mótvegis evruni, frá 1,34 til 1,32. Grundleggjandi rákið er tó enn ein veikari dollari komandi tíðina. Hesa vikuna kunnu væntast lutfalsliga stór sveiggj í evru-dollar kursinum, mest orsakað av at ein uppgerð yvir útlendskar íløgur í USA verður almannakunngjørd mikudagin. Hon sigur nakað um, hvussu hugurin hjá útheiminum hevur verið at keypa dollarar.

Lánsbrævarenturnar hildu áfram at lækka í farnu viku. Soleiðis halda stórir íleggjarar, sum hava havt ov lítið av lánsbrøvum síðan í summar, áfram at keypa lánsbrøv, hóast 10-árs rentan í Danmark nú er heilt niðri á umleið 3,80%. Tá hugsað verður um, at búskaparligi vøksturin í Evropa hóast alt er uppi á umleið 2,0%, sæst at tað ikki er hann, ið heldur rentunum niðri.

Sum væntað gjørdist farna vika friðarlig hjá partabrøvum og liggja tey í dag áleið á sama stigi sum fyri viku síðan. Lági dollarin og óttin fyri væntandi vøkstri, kann tálma vøkstrinum á evropiskum partabrøvum. Kaupthing metir at hetta verður ein friðarlig vika hjá partabrøvum, sum tó kann ávirkast av viðmerkingum, ið verða eftir rentufundin hjá FED.

Hesa vikuna koma fleiri áhugaverd lyklatøl. Úr USA koma m.a. tøl fyri smásøluna, ídnaðarframleiðsluna, handilsjavnan og útlendskar íløgur. Í Evropa er tað mest áhugaverda tøl fyri prísvøksturin. Amerikanski tjóðbankin heldur rentufund týsdagin, har lítil ivi er um at tey fara at seta stuttu rentuna upp við 0,25% til 2,25%.

Sosialurin
Sosialurin
i